



*Gaza-búgvar slikka sárini eftir eina tríggjar vikur langa og harðrenda ísraelska innrás, og týsdagin skal ísraelska fólkið velja, hvør politikkur skal førast yvirfyri palestinum komandi fýra árini. Í løtuni stendur andstøðuleiðarin úr Likud-flokkinum, Benyamin Netanyahu (høgrumegin), til at vinna valið, og hann ynskir at herða politikkin yvirfyri palestinum. Fremsti kappingarneytin er ísraelski uttanríkisráðharrin Tzipi Livni (vinstrumegin), forkvinna í núverandi stjórnarflokkinum Kadima*

# Hvat nú,

**Andstøðan stendur til at vinna ísraelska tjóðartingsvalið týsdagin, og tað merkir, at politikkurin yvirfyri palestinum verður herdur. Samstundis roynir altjóða samfelagið at sameina palestinsku flokkarnar og endurreisa eina friðartilgongd í skeljasori**



MIÐEYSTUR
*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*

Støvið hevur lagt seg í Gaza. Tungu roykskýggini eru horvin. Og oyradoyvandi brestirnir frá ógvusligu ísraelsku bumbuálopunum eru steðgað á hesum sinni. Tann tríggjar vikur langa ísraelska innrásin í tann lítla Gaza-geiran ímóti islamistiska felagsskapinum Hamas, sum byrjaði tann 27. desember, kostaði umleið 1300 palestinum lívið, og fleiri túsund onnur vórðu særd. Knøpp helvtin av teimum deyðu vóru sambært Altjóða Reyða Krossi sivil. Sjeyndi hvør bygningur í Gaza varð javnaður við jørðina, sum verður mett at kosta umleið tvær milliardir dollarar at byggja upp aftur. Og talið av flóttafólkum er fleirfaldað.

Sameindu Tjóðir, Altjóða Reyði Krossur og aðrir mannarættinda- og hjálparfelagsskapir hava harðliga fordømt ísraelsku innrásina, sum kostaði trettan ísraelum lívið. Myndir av deyðum og løstaðum børnum ferðaðust um allan heim og elvdu til mótmælisgongur úr Paris, London og Keypmannahavn til Kairo, Teheran og Damaskus. Á BBC og CNN hava prominentir løgfrøðingar skuldsett ísraelsku stjórnina fyri krígsbrotsverk og brot á Geneve-sáttmálan, sum ásetir leiðreglur fyri krígsførandi tjóðir. Høvuðsskuldsetingin er, at Ísrael ikki gjørdi nóg mikið fyri at spara sivila fólkið, og at Ísrael nýtti tær ólógligu fosfor-granatirnar undir innrásini.

### Tingingar í Kairo

Hvat fekk Ísrael burturúr innrásini? Málið var at oyðileggja hernaðarliga kapasitetin hjá Hamas og steðga felagsskapinum at senda rakettir inn í Suður-ísrael. Sambært ísraelsku hernaðarleiðsluni eydnaðist at oyðileggja umleið 70 prosent av vápnagoymslunum hjá Hamas og drepa millum 600 og 700 hermenn. Umframt hetta sigst Ísrael hava oyðilagt umleið 400 av teimum mongu undirjørðisku tunlunum, sum ganga úr Sinai-oyðimørkini í Egyptalandi og inn í Gaza, haðani Gazabúgvar fáa sínar vørur og Hamas fær síni vápn, fyrst og fremst frá Iran. Men eingin veit við vissu, hvussu stórur partur av hesum undirjørðiska infrakervinum er oyðilagt, og arbeiðið at byggja nýggjar tunlar fór beinanvegin í gongd eftir innrásina. Egyptaland hevur lovað at økja um eftirlitið við vápnasmugling inn í Gaza, og Bretland og Frakland eru tøk at veita eyka útgerð. Bæði Ísrael og Hamas hava lýst vápnahvíld, sum longu er brotin tvær ferðir við smærri samanstoytum. Tí fer einans tíðin at vísa, um tað eydnaðist Ísrael at røkka endamálinum við ógvusligu innrásini.

Hvat fekk Hamas burturúr? Fyrst og fremst økt altjóða trýst á Ísrael um at steðga blokaduni av vørum til og úr tí lítla Gaza-geiranum. Síðani Hamas tók valdið í Gaza í 2006 eftir ein valsigur og eitt blóðigt borgarakríggj við hin stóra palestinska flokkin, Fatah, hevur Ísrael blokerað fyri vørum og tænastum, eisini neyðsynjarvørum so sum heilivági, vatni, streymi og mati, fyri at leggja trýst á Hamas. Ísrael hevur bygt ein sonevndan trygdarmúr kring allan geiran, og hjálparfelagsskapir sammeta økið við heimsins største fongsul og finnast at ísraelska sanktiónspolitikkinum, sum svøltar gazabúgvar og hevur elvt til eina humanitera neyðstøðu.

Eftir at hava stuðlað ísraelska isolatiónspolitikkinum er vesturheimurin nú farin at spyrja, um hesin politikkurin ikki bert hevur gjørt ilt verri. Desperata vónloysið í Gaza tykist einans at hava styrkt um Hamas og mótstøðuna ímóti Ísrael. Á toppfundi í Kairo týsdagin í farnu viku fóru nýggjar diplomatiskar royndir í gongd við endamálinum at fáa í lag eina varandi vápnahvíld millum Ísrael og Hamas. Hetta var fyrsta arbeiðsuppgávan hjá nýggja amerikanska sendimanninum fyri Miðeystur, Dennis Mitchell, sum saman við ES-leiðarum, talsfólkum fyri ísraelsku stjórnina og ymsum palestinskum fraktiónum tingaðust um treytirnar fyri eini varandi vápnahvíld.

Palestinar krevja, at Ísrael letur upp mørkini inn í tann avbyrgda